# Skula vit vera sum øll hini?

GUNNAR K NATTESTAD



Tað hevur til allar tíðir verið ein innari og ytri bardagi hjá einum menniskja, at taka støðu til, í hvussu stóran mun ein skal handla eftir egnari sannføring í mun til at lata seg stýra av øðrum. Hjá børnum verður ofta hildið at hettar er sera sjónligt, tá tann, ið skilir seg út verður argaður, meðan tann, ið tekur við felag norminum, sleppur at vera partur av tí "góða felagskapinum".

Í umrøðuni um hvør støða skal takast til málið um at seta kynsliga orientering inn í lóg, tykir mær at vit í stóran mun eru í somu støðu. Nógv sjónarmið verða førd fram til frama fyri bæði ja og nei, og ymiskt er hvat verður nýtt sum grundarlag.

Eitt sum skal tala fyri at taka undir við málinum, er at okkara grannalond øll hava framt somu broyting og tí skula vit bara fylgja við streyminum, fyri framhaldandi at verða við í "tí góða felagskapinum". Fleiri eru eisini áheitaninar úr hinun norðanlondunum um at syrgja fyri at Føroyar fáa somu lóggávu sum hini; annars eru vit ikki eitt samfelag á hædd við hini.

Myndin úr skúlagarðinum kemur fram fyri meg, har næmingurin, ið ikki vil gera sum "klikan" tilskilar, verður hóttur við at verða koyrdur út í kuldan.

Í hesum tíðum har nógv krút verður brúkt at hálova tolsemi og minnilutaverju, klingar hendan "go with the flow" hugsan eitt sindur hult. Minnilutar í samfelagnum skula hava ávísa ser-verju fyri at tryggja teirra rættindi, men tá tað kemur til okkum sum lítil tjóð, eru somu grundgevingar ikki galdandi.

Eitt er at harðskapshendingin, sum í hesum føri eru heilagi upprunin til at kjakið er komi fram aftur, als ikki hevði givið myndugleikunum nakað sum helst betur amboð, um umtalaða lógarbroyting var í gildið; eitt gott dømið uppá hvussu líkasæl humanisman og partur av "objektiva" og "public service" jurnalistikkinum er við hvat er rætt og skeivt, bara so leingi tað tænir einum ávísum endamáli.

Hitt er tann meira grundleggjandi spurningurin, um tað í hesum føri er rætt at "gera sum hini" bara fyri at "verða sum hini".

Okkara samfelag eri ikki nakað "paradís" á jørð í mun til øll onnur lond, men tað er so sanniliga heldur ikki ein Taliban-líknadi statur har m.a. homosexuell ganga friðleys og ikki hava nakran góðan. Hesin sexuelli minniluti hevur, mótsatt teimum lygnum ið førdar eru fram, júst somu verju í lógini sum einhvør annar.

Ein far tó tað fatan at málið veruliga ikki snýr seg um at gera umstøðurnar hjá einum bólki betur, men heldur um at seta ein annan bólk/land uppá pláss, tí tað her hevur valt at fylgja eini aðrari sannføring, ið ikki stemmar við tað meirilutin í okkara góðu kliku sigur.

Norðurlendsk hagtalsárbók vísti fyri kortum, at Føroyar á mongum økjum eru best fyri, heldur enn at vera "reyvin av fjórðu deild", sum man mangan far fatan av. Møguliga er grund til at spyrja hví hettar er so? Kann tað skyldast tey virðir vit í stóran mun hava bygt okkara samfelag á, men sum standa fyri at verða skift út við virði, ið hini grannalondini hava og líða undir?

Eitt er vist, verður grundarlagi skift út so koma vit eisini at smakka avleiðingarnar!

# Fundamentalisma tá hon er vandamest

ELLEN RASMUSSEN

Eftir at verða aftur í Danmark, eri eg vónsvikin av tí sum fyllir so nógv, bæði í fjølmiðlum og kjaki millum fólk.

Fundamentalisma og alt tað, ið kemur burtur úr fundamentalismu. 11. sept. sum vit øll minnast sera væl, og sum hevur sett ótta í hvørt mansbarn, hevur nú smittað, og fer nú sum ein herjandi umfarsjúka yvir alt Danmark.

Eingin tosar um tað sum er tann grundleggjandi trupulleikin, men vit síggja og hoyra í smáðum pettum. Øll tosa um tað sínamillum, - við varsemi, - fyri ikki at verða nevndur rasistur, men øll eru samd í, at Danmark er komið til tað sum vit nevna – *"point of no return"*.

Demokrati verður sett spurnartekin við, hvar gongur markið, og hvønn skulu vit taka atlit til.

Er tað demokrati at ansa eftir hvat vit skulu tora at siga?

Hvørji eru tey, vit skulu "taka hensyn til"?

Hvør hevur skapt alla hesa øðing? Etc.etc.

Svarið er einfalt: - fundamentalistiskir islamar. Eg kann blíva so dansiterandi í øðini....Hvat billar hetta fólkið sær inn? Koma til Danmarkar.

Fáa eina feita íbúð, og ein góðan kekk.

Fáa útbúgving sum verður goldin av landinum, fyri so at smoyggja eina átrúnaðarliga húgvu yvir fólk sum als ongan áhuga hevur fyri hesum.

Áleggja fríum danskarum at uppføra seg og hava meiningar, sum kemur av einari trúgv, sum islamar sjálvir ikki megna at stýra.

Eg minnist fyri fýra árum síðani, áðrenn eg flutti til Føroyar, tá bardist tann danski fólkaflokkurin sín bardaga fyri at fáa tamarhald á hesum trupulleika, men ístaðin fyri at lurta, blivu teir kallaðir rasistar.

Um val verður nú, eri eg bangin fyri at sigurin ferð til fólkaflokkin, tí nú síggja øll, at hetta hevur einki við rasismu at gera, men er ein átrúnaðarlig støðutakan sum er skapt av menniskjum, og ikki av Koranini. Ein støðutakan har muslimar ikki halda høvdið kalt, men blanda politik og religión saman. Hetta er ein farligur koktail.

Vit sóu eitt klipp frá talibanum, ið søgdu hetta sera klárt: at demokrati og materalisma var rótin til alt ónt, men teir vildu gera alt fyri at koma hesum til lívs.

Danskarar ganga nú á leistum, bangnir fyri at traðka á tærnar hjá musliminum. Teir finna seg á ókendum øki, og gerðast lítlir og uttan integritet.

Soleiðis sum eg síggi Danmark frá barnið av sum nærmast kann bindast við far til fire filmanar ella Mortan Korck, ella ja .... Matador ...Tað er farið...

Alt hetta, sum eg kundi skrivað nógvar síður um, fær meg at hugsa aftur á tá eg seinast, fyri skjótt trimun árum síðani flutti aftur til Føroyar.

Eg eri sera politiskt ágrýtin og havi altíð fylgt við politikki, havi ikki havt høvið at velja í Føroyum tey nógvu seinastu árini, tíanverri, men havi altíð fylgt við. Serliga hesi trý árini eg búði heima, er myndin eg havi fingið av tí politiska rákinum, - og málini sum hava verið frammi, - minna alt um alt tað kensluna eg siti við herniðri, og mangan hevur hetta verið samtaluevni við døgurðaborðið og tann ræsta fiskin, heima hjá okkum.

Áðrenn eg fór á HF vóru mál sum: - frí fosturtøka, samkynd og frí søla av rúsdrekka frammi. Føroyingar standa í stað, og teir koma bara ikki víðari.

Spurningurin er: Hvør steðgar teimum? Er demokrati í Føroyum? Eg setti mær ofta henda spurning tá eg var heima, og svarið er sera einfalt, NEI.....har er einki demokrati.

Føringurin sjálvur hevur ikki tann fría viljan og torir ikki at standa frítt fram, tí antin steðgar lógin, ella trúgvin honum, og ofta bæði vavd saman í eitt.

Eg fái kuldaskjálvta tá eg hoyri og síggi hesar fundamentalistar sita og ráa í landinum, og fólkinum, og minnir ikki stórt um annað enn tað vit sita í Danmark.

Alt ov ofta havi eg eisini hoyrt um hvussu ein eigur at uppføra seg ...... Hvat er hetta fyri nakað? - Í mun til hvat? - Í mun til politiskar meiningar, trúgv, ella hvat grannin sigur ella heldur, ella hvar kemur hesin smáborgarligi hugsunarháttur frá?

Fólkið sjálvt stendur veikt, og er smittað av tí politiska rákinum. Fólkið fylgir við streyminum, uttan at vera kritiskt í mun til hvat gongur fyri seg, og ringast av øllum, tey sum tora tað, verða kveistrað burtur. Tann fundamentalistiski meirilutin ræður.

Danir hava funnið útav hesum, í tey fýra árini eg havi verið heima. Føringar hava ikki funnið útav hesum enn, og berjast als ikki ímóti. Tað gevur "*stof til eftertanke*". Hetta er ikki tí at føringar eru seinir í fatanini ella eru býttari enn onnur, hetta kemst av at teir tora ikki annað enn at fylgja fjøldini, tí annars verða teir varpaðir út, ikki út av landinum, men út frá at hava møguleikar til at skapa nakað.

Eg havi livað í einum demokratiskum landi, og hetta gevur nakrar avbjóðingar. Avbjóðingar sum ger ein føran fyri at velja og - velja frá. Hendan møguleikan hava føringar ikki, tí tað verður valt fyri hann í einum hásæti sum stýrir hvat er gott og minni gott fyri hann, hettar minnir um fundamentalismu. *Synd* er, at stýrið ikki hevur tað álit á sínum borgarum, tá borgarin hevur havt tað álit at velja teir inn.

*Synd er*, at borgarin ikki sjálvur kann finna útav hvat er gott og minni gott fyri hann, og torur at skapa sína egnu meining.

Hvat er tað, teir sum stýra eru bangin fyri? At missa eftirlit, ella bangið fyri ábyrgd?

Vit vita, at við frælsi fylgir ábyrgd fyri hvønn einstakan, ábyrgd fyri at velja tað sum er gott fyri ein, og skapar minst skaða.....

Hví tora tey sum stýra ikki at geva tað ræði til hvønn einstakan? Ja Føroyar er ein kristin tjóð, men fyri mær er tað onkur í hásætinum sum ikki hevur lisið Bíbliuna nóg væl, og hevur misskilt tað at verða menniskja við eini kristnari trúgv. Vit eru menniskju, og í kraft av at vit eru menniskju, eru vit syndarar. Í Guds eygum eru vit eins stórir syndarar. Sum ein prestur segði so gott og eg citeri: "*tit skulu minnast til, at kirkjan er full av syndarum*". Tað er akkurát tað sum vit skulu minnast. Eingin kann døma uttan ein, eingin politikkari kann fortelja einum vaksnum hvat er gott og hvat er minni gott, tí vit eru øll syndarar, og ikki minst... eingin politikkari kann døma nakran, tí tað er bert ein ið kann døma...

At tað sita nakrir politikarar og halda seg verða Gud í einum politiskum máli, er ein farligur coctail. Hettar er fundamentalisma tá hon er vandamiklast.

Eg haldi at Føroyngar skulu vakna. Verða kritisk til tað sum gongur fyri seg. Verða meira tollerantir, og ikki minst, góðtaka tað at ikki øll eru eins, men seta prís uppá at vit øll eru ymisk, soleiðis at tað verður eitt meira litríkt land, har hvør einstakur gerst ríkari við tí í geyma, at ein og hvør skal hava loyvi til at hvíla í sær sjálvum, uttan at grannin, trúgvin ella politikkur seta foringar.

# Tilgongdir í fólkaræðinum

KJARTAN KRISTIANSEN



*Tó at tað hevur alt at siga fyri eitt menniskja sum einstakling, at hansara trúgv er tann rætta (sanna), er hetta ikki so fyri eitt samfelag. Eitt samfelag eigur hvørki vón um ella ótta fyri einum øðrum lívi. Tað sum hevur týdning fyri samfelagið er ikki, um borgararnir hava rætta (sanna) trúgv, men at teir viðurkenna sær eina trúgv.*

(Alexis de Tocqueville)

Alexis de Tocqueville er uttan iva kendasti heimsspekingurin í fólkaræðisligum spurningum. Her í Evropa eru Montesqieu og aðrir meira kendir, men í USA kemst ikki uttan um Tocqueville. Har verður aftur og aftur bent á hann, og valla nøkur setanarrøða hjá nývaldum forseta hevur ikki tilvísing til hansara.

**Meirilutin ræður**

Kári Petersen syngur so vísiliga í vísuni, *Meirilutin ræður*:

*- Men – gerast fólk klók*
*av at fylkjast í flokk*
*so vóru vit bæði vísmenn,*
*um vit vóru nokk,*
*tó málfrøðin mest hevur*
*fávit mítt fest,*
*um flest merkir best ella*
*barasta flest.*

Alexis de Tocqueville óttaðist eisini henda partin av fólkaræðinum og sigur:

*Moralski myndugleikin hjá meirilutanum er partvíst grundfestur í hugsanini, at meira vit og vísdómur er savnaður í einum hópi av sameindum fólkum enn í einum einstaklingi, og at talið av løggevarum hevur størri týdning enn dygdin í teimum.*

Hann leggur afturat: *at áhugin hjá teimum mongu verður tikin fram um tann hjá teimum fáu.*

***– men nú tykir mær ráðiligast, at vær latum heldur ikki teir ráða, ið grammastir vilja ganga móti hvørjum øðrum; men latum oss ganga millum partarnar, so hvør teirra fær nakað av sínum framt og allir hava eina lóg og ein sið. Tað man vera satt, at um vær slítum lógina sundur, slítum vær og friðin.***

(Torgeir løgsøgumaður í Ara Torgilssonar Íslendingabók í týðing Jákups Bergs)

Eftir hesi orð legði Torgeir fram tað uppskot um semju, sum menn tóku undir við og gjørdi Ísland kristið.

Trúliga gjørdi tað mun, at bannað var tá kristnum at reka handil við heidnar. Meginparturin av Evropa var kristnaður, og tí vóru handilsleiðirnar hjá heidnum íslendingum skerdar; Íslandi tørvaði eitt nú við og korn úr Evropa.

**Løgtingsins leiklutur er ikki at ganga undan**

Alexis de Tocqueville vísir á, at tað er skeivt at halda, at tú við lóg kann skapa eitt nýtt samfelag. Lógirnar verða skrivaðar út frá tí, sum vit samdust um í gjár, allar undanfarnar gjárdagar. Siðir og siðvenja orða okkara lógir – ikki øvugt.

Tað tekur ofta sína tíð hjá løgtingi og løgtingslimum at hoyra nóg væl, hvønn veg tað ber í síðum og hugburði í samfelagnum, t.e. hjá veljarunum, og líka ofta eru tað minnilutarnir, *ið grammastir vilja ganga móti hvørjum øðrum*, sum løgtingslimir munu óttast mest, serliga nú upp undir val.